# Lalandia við uttandura svimjihyli

Feriustaðið Lalandia er víðagitið sum eitt tað besta feriustaðið í norðurlondum. Fólk koma víðahvar til Lalandia, sum liggur har suðuri í Danmark. Eisini nógvir føroyingar seta kós ímóti Lalandia, tá ið tey fara í feriu.

Lalandia er kent fyri eitt sera stórt og flott baðiland, sum er innandura, og hetta baðilandið er nú eisini víðkað við einum heitum uttandura svimjihyli.

Hetta hevur verið eitt ynski frá gestunum á Lalandia, og feriustaðið hevur gjørt nakað við hetta ynskið. Eisini verður skreiðibreyt uttandura.

Útbyggingin av Lalandia verður gjørd so snildisliga, at fólk kunnu lættaliga fara út um at savla sær á, tá ið tey eru í baðilandinum.

Meira kann lesast um Lalandia á heimasíðuni www.lalandia.dk






















